2026

Fíggjarmálaráðið

Búskaparfrágreiðing II

Fíggjarlógaruppskotið 2026

September 2025

Innihald

Inngangur 2
Lýsing av gongdini í búskapinum 4
Almenn fíggjarmál 19
Uppskotið til fíggjarlóg fyri 2026 22
Inntøkur landskassans í 2026 22
Útreiðslur landskassans í 2026 23
Løgur í 2026 24
Játtanareftirlit í fíggjarárinum 2025 26
Rakstrarjáttanareftirlit 28
§ 1 Løgtingið 28
§ 2 Løgmansfyrisitingin 29
§ 3 Fíggjarmál 30
§ 5 Fiskivinnu- og samferðslumál 31
§ 6 Uttanríkis- og vinnumál 32
§ 7 Barna- og útbúgvingarmál 33
§ 11 Heilsumál 35
§ 12 Almanna- og mentamál 36
§ 14 Lógarmál 38
§ 18 Umhvørvismál 39
Inntøkujáttanareftirlit 40
Løgujáttanareftirlit 42

Inngangur

Sambært § 9 í løgtingslóg nr. 42 frá 4. mai 2009 um landsins játtanarskipan skal landsstýriskvinnan í fíggjarmálum, samstundis sum fíggjarlógaruppskotið verður lagt fram, leggja fram frágreiðing (Búskaparfrágreiðing II), sum gjølligari lýsir og metir um innihaldið í fíggjarlógaruppskotinum og greiðir frá játtanareftirlitinum í fíggjarárinum.

Úrslitið hjá landinum í 2024 var hall á um 170 mió. kr. Hallið kom í stóran mun av, at nakrar týðandi inntøkur hjá landinum vóru lægri enn væntað. Nevnast kunnu avgjaldið á fiskatilfeingi, loyvisgjaldið á alivinnuna og skrásetingargjaldið á akfør, sum øll vóru lægri enn væntað í samtyktu fíggjarlógini fyri 2024. Harafturat varð nakað brúkt av framfluttum løgujáttanum frá eldri árum. Brúktar vórðu um 585 mió. kr. í løguútreiðslum í 2024.

Fíggjarmálaráðið roknar við, at landskassin fer at hava hall á um 180 mió. kr. í 2025. Nýtslan av løgujáttanum og løgukendum játtanum verður mett at vera um 125 mió. kr. hægri enn í fíggjarlógini. Inntøkurnar verða mettar at vera um 65 mió. kr. hægri enn í fíggjarlógini.

Stórt trýst verður á útreiðslurnar hjá landi og kommunum næstu árini, millum annað orsakað av broyttari fólkasamanseting. Stórur búskaparvøkstur hevur verið í fleiri ár, men vøksturin í 2024 og 2025 hevur helst verið nakað minni enn undanfarnu tvey árini. Fíggjarmálaráðið roknar við, at vøksturin, sum frálíður, fer at minka nakað, men enn síggjast ikki greið tekin um tað.

Ein onnur útreiðsla hjá landinum, sum kann væntast at vaksa næstu árini, er rentuútreiðslurnar av skuldini (brutto). Rentuútreiðslurnar fara at vaksa, so hvørt sum verandi skuld verður endurfíggjað til hægri rentu, sammett við rentustøðið fram til 2022. Harafturat fer skuldin at hækka í 2026 av væntaða hallinum hjá landinum, umframt at minstagjaldførið hækkar, so hvørt sum BTÚ veksur.

Uppskotið til fíggjarlóg fyri 2026 er gjørt við støði í samtyktu játtanarkørmunum. Inntøkurnar eru mettar varisliga. Lagt er til grund, at vøkstur verður í inntøkunum hjá landinum í 2026, sum samsvarar áleið við metta búskaparvøksturin í 2026.

Framrokningarnar av inntøkum og útreiðslum í uppskotinum eru dagførdar og grundaðar á verandi lóggávu og bundnar raðfestingar. Inntøkurnar í uppskotinum til fíggjarlóg fyri 2026 eru framroknaðar við støði í søguligum tølum fyri inntøkur og annars við støði í fyritreytum og lóggávu, sum er galdandi í løtuni. Inntøkur og útreiðslur eru framroknaðar við ársins prísum í 2026 og framroknaðar við føstum prísum árini 2027 og frameftir.

Stórur partur av inntøkunum í fíggjarlógini eru skattir og avgjøld, sum ávirkast av búskaparligu sveiggjunum, sum eru í samfelagnum, yvir tíð. Inntøkusíðan í fíggjarlógini er tí fyri stóran part grundað á metingar um gongdina í búskapinum.

Útreiðslusíðan er ikki eins torfør at meta um, av tí at størsti parturin av útreiðslunum er grundaður á politiskar raðfestingar av tænastum og veitingum, sum samtykt er við løgtingslóg, at almennu Føroyar skulu bjóða. Óvissan á útreiðslusíðuni snýr seg í stóran mun um gongdina í rentum, gongdina í oljuprísum og um úrslitini av lønarsamráðingunum á almenna arbeiðsmarknaðinum.

Sum grundarlag undir metingunum um búskaparvøkstur næstu árini verða brúkt søgulig tøl, vitan um búskapargongdina síðstu árini og vitan um gongdina innan ymisk búskaparlig vísitøl. Eisini verða metingar hjá Búskaparráðnum og ymiskum altjóða stovnum brúktar sum partur av grundarlagnum at meta um búskaparvøksturin og inntøkurnar hjá landinum næstu árini.

Eisini skal viðmerkjast, at í framrokningunum er lagt upp fyri serligum viðurskiftum í ávísum vinnugreinum, har ið umstøðurnar tala fyri tí. Í fyritreytunum fyri 2026 verður vøksturin í BTÚ mettur til um 4,5% (ársins prísir). Metingin hjá Fíggjarmálaráðnum er grundað á eina varsemisreglu.

Skatta- og avgjaldsinntøkur, ið eru grundaðir á inntøku og nýtslu, til dømis vanligur landsskattur og meirvirðisgjald, verða í fyritreytunum settar at vaksa varisliga, tað er á leið við sama vøkstri sum metti vøksturin í BTÚ í 2026. Tó eru gjørdar serligar metingar út frá fyritreytunum fyri játtanini á teimum inntøkujáttanum, har tað verður mett neyðugt, og har, ið umstøðurnar tala fyri tí.

Fyritreytirnar fyri framskrivingunum av rentuútreiðslunum eru metta gongdin í landskassaskuldini og útlitini fyri rentugongdini komandi 1-2 árini. Altjóða rentustøðið hækkaði munandi í 2022 og 2023, men í 2024 lækkaði rentustøðið aftur. Roknað verður við, at rentustøðið í Evropa verður óbroytt ella lækkar eitt vet næstu 1-2 árini. Rentugongdin næstu 1-2 árini er treytað av, hvussu prísgongdin og gongdin á arbeiðsmarknaðinum verður og gongdin í øðrum búskaparligum lyklatølum. Tekin eru um, at rentuhækkingarnar í 2022 og 2023 hava tálmað prísvøkstrinum, og at tamarhald nú er á prísvøkstrinum.

Av tí at landskassin vanliga endurfíggjar um eina mia. kr. árliga av samlaðu lánsbrævaskuldini, sum er um 5 mia. kr. í 2025, hækka rentuútreiðslurnar hjá landinum nakað í 2025 og í 2026.

Frágreiðingin er sett soleiðis saman, at fyrst er stutt lýsing av gongdini í føroyska búskapinum og í altjóða búskapinum. Síðani er ein lýsing av fíggjarlógaruppskotinum fyri 2026. At enda er frágreiðing um játtanarligu støðuna í ár, samanlagt og fyri hvørja grein sær. Her eru bara tiknar við tær rakstrar-, løgu- og inntøkujáttanir, sum verða mettar at víkja frá upprunaligu játtanini.

Lýsing av gongdini í búskapinum

Fíggjarmálaráðið metir sum heild, at útlit eru til hóvligan og varisligan búskaparvøkstur næstu 1-2 árini. Eins og vanligt er, eru stórar óvissur um metingarnar. Júst nú er óvissan serliga knýtt at gongdini í heimsbúskapinum, undir hesum ávirkanir av broyttum umstøðum og treytum viðvíkjandi tolli og altjóða handli millum stóru marknaðirnar í heiminum.

Prísvøksturin er lækkaður munandi í øllum Evropa, og tamarhald tykist vera á prísvøkstrinum. Tað hevur eisini gjørt, at realinntøkan hjá flestu húsarhaldum er hækkað og er komin aftur á støðið frá umleið 2021, áðrenn prísvøksturin tók dik á seg.

Tó er eisini greitt, at tað sjálvsagt sæst aftur í búskapinum og fer at síggjast í fleiri lyklatølum, at altjóða laksaprísir hava verið óvanliga lágir í ár, og at tað fer at ávirka vinningin og avlopini hjá fyritøkum í hesari vinnuni.

Mynd 1
Bruttotjóðarúrtøka í ársins prísum, broyting í % um árið, 2005-2026



Viðm.: Tølini fyri 2024 til 2026 eru fyribils metingar og forsagnir og skulu lesast við neyðugum fyrivarnum.
Kelda: Hagstovan, metingar frá Búskaparráðnum og Fíggjarmálaráðnum.

Lyklatøl vísa, at vøksturin minkaði í 2024, sammett við í 2023, sum millum annað hevur samband við verkfallið á privata arbeiðsmarknaðinum í mai og juni í 2024. Týðandi partur av vøkstrinum kemur framvegis av prís- og lønarvøkstri heldur enn av vøkstri í nøgdum. Í mynd 1 omanfyri síggjast metingar av gongdini í BTÚ síðstu árini. Forsagnir og varisligar metingar fyri 2026 eru eisini vístar í myndini.

Hóast avlopini í alivinnuni eru minkað munandi í ár, so síggjast ikki tekin um, at realbúskaparliga virksemið innlendis í Føroyum er minkað í ár, sammett við í 2024. Árið 2024 var tó serligt orsakað av verkfallinum á privata arbeiðsmarknaðinum. Fleiri lyklatøl vísa hinvegin, at innlendis virksemið í búskapinum er vaksið miðskeiðis í 2025. Til dømis er trendurin í lyklatølum fyri lønargjaldingar, starvsfólk og tilflyting kvinkaður uppeftir miðskeiðis í 2025.

Forsagnir benda á, at rentustøðið verður støðugt næsta árið. Stórur vøkstur hevur verið í bruttotjóðarúrtøkuni (BTÚ) í ársins prísum síðani 2021, tá ið gongd kom á aftur búskapin eftir

koronufarsóttina. Vøksturin í ársins prísum er mettur til út við 7% í 2023 og 3,3% í 2024. Fíggjarmálaráðið roknar fyribils við vøkstri í ársins prísum á 3-4% í 2025 og 4-5% í 2026.

Størstu orsakirnar til vøksturin í 2024 og 2025 eru vaksandi útflutningur í virði og almennar og privatar íløgur. Metingarnar eru grundaðar á eina varsemisreglu og yvirhøvur á ta óvissu, sum knýtir seg at tílíkum forsagnum.

Framgongd í innlendis búskapinum, hóast altjóða laksaprísir eru lækkaðir nógv

Hagtøl og lyklatøl benda á, at búskaparvøksturin er hildin fram í ár, og at hann helst hevur tikið dik á seg miðskeiðis í 2025. Hetta skal skiljast soleiðis, at framgongd sæst í innlendis realbúskapinum, hóast avlopini hjá fyritøkum í alivinnuni eru minkað nógv, orsakað av lægri altjóða prísum á aldum laksi. Framgongdin í búskapinum miðskeiðis í 2025 sæst millum annað á arbeiðsmarknaðinum og á til- og fráflytingini úr Føroyum.

Vøksturin síðani 2021 er í stóran mun komin av vaksandi útflutningi, stórum uppsjóvarkvotum, av størri tøku av alilaksi í 2021, høgum altjóða prísum á laksi síðani 2022 og annars av høgum matvøruprísum um allan heimin og betri býtislutfalli í uttanríkishandlinum. Útflutningurin tilsamans vaks ikki stórvegis frá 2022 til 2024, men roknað verður við, at hann veksur 5-6% í 2025 í virði.

Nógv bendir á, at miðbankar hava fingið tamarhald á prísvøkstrinum, sum tók dik á seg eftir tíðina við koronu, og orsakað av russisku innrásini í Ukraina. Prísvøksturin er lækkaður aftur, og roknað verður nú við prísvøkstri á um 2% í 2025 og í 2026 (Danmarks Nationalbank, Udsigter for dansk økonomi, 24. sept. 2025).

Prísvøksturin innan matvørur og brennievni síðani 2022 merkir, at húsarhald hava minni keypsorku til privata nýtslu. Hinvegin hava stóra lønarhækkingar verið í 2024 og 2025, sum gera, at reala inntøkan hjá flestu húsarhaldum nú aftur er á støði við inntøkurnar, áðrenn prísvøksturin tók dik á seg í 2021. Fíggjarmálaráðið metir, at møguleiki er fyri, at privata nýtslan og eftirspurningurin kunnu hækka spakuliga og hóvliga næstu 1-2 árini, og at tað í so fall fer at geva eitt ávíst íkast til búskaparvøksturin.

Fíggjarmálaráðið roknar við, at arbeiðsloysið verður verandi lágt næstu 1-2 árini, hóast arbeiðsloysið kann hækka nakað, um búskaparvøksturin minkar. Tað er grundað á, at arbeiðsmarknaðurin er sera væl fyri, at arbeiðsmegin er flytfør tvørturum vinnugreinar og øki, og at tilflytingin av útlendskari arbeiðsmegi er vaksin nakað síðstu mánaðirnar. Harafturat er stórur tørvur er á arbeiðsmegi í fleiri vinnugreinum.

Fólkatilflytingin er minkað síðani 2022, men arbeiðsloysið er framvegis metlágt, og talið av starvsfólkum í innlendis búskapinum er methøgt og hækkar omanfyri 1% um árið (trendurin). Almenna skuldin er ikki høg, sammett við londini í OECD, samfelagið hevur stóra nettoogn mótvegis útlondum. Forsagnir benda á, at rentustøðið í Evropa verður støðugt ella møguliga lækkar eitt vet í 2026. Hvussu skjótt renturnar fara at lækka, valdast millum annað, hvussu gongdin verður í prísvøkstrinum og á arbeiðsmarknaðinum í Evropa næsta árið.

Føroyska bruttotjóðarúrtøkan er vaksin úr um 270 tús. kr. fyri hvønn íbúgva í ár 2010 til mettar um 510 tús. kr. fyri hvønn íbúgva í 2024 og um 520 tús. kr. fyri hvønn íbúgva í 2025. Í Danmark er bruttotjóðarúrtøkan mett til um 490 tús. kr. fyri hvønn íbúgva í 2024. Í ár 2010 var bruttotjóðarúrtøkan fyri hvønn íbúgva um 20% hægri í Danmark enn í Føroyum.

Ábendingar um fløskuhálsar og trot á arbeiðsmegi síggjast framvegis í búskapinum, serstakliga innan byggivinnuna, aðrar handverksvinnur. Avleiðingarnar av hesum síggjast eisini á bústaðarmarknaðinum. Eisini handilsvinnuni og øðrum privatum tænastuvinnum tørvar arbeiðsmegi. Sambært konjunkturbarometrinum sigur umleið helmingurin av fyritøkunum í byggivinnuni frá, at trot á arbeiðsmegi avmarkar møguleikarnar at vaksa meira um framleiðsluna.

Útlánsvøksturin sæst í mynd 2 niðanfyri. Realkredittlán, sum føroysk húsarhald kunnu taka úr donskum realkredittfeløgum, vuksu nógv frá frá 2018 til 2022, men síðstu trý árini eru tey minkað aftur. Realkredittlánini eru minkað úr um 4 mia. kr. miðskeiðis í 2022 til um 3,3 mia. kr. miðskeiðis í 2025. Síðsta árið eru realkredittlánini til føroysk húsarhald minkað út við 4%.

Bruttoútlán frá føroyskum peningastovnum til húsarhald í Føroyum eru vaksin 6,3% síðsta árið. Ein orsøk til høga vøksturin í útlánum frá peningastovnunum til húsarhald er, at fleiri húsarhald nú fíggja sethús við lánum úr peningastovnunum heldur enn við realkredittlánum, tí lánini úr peningastovnunum eru vorðin meira kappingarfør. Útlán til vinnufeløg eru vaksin út við 12% síðsta árið, sí mynd 2A.

Mynd 2

Inn- og útlán til húsarhald í Føroyum, føroyskir peningastovnar, mia. kr., sept.-2013 til juli-2025



* Nettoinnlán í mynd B er munurin millum inn- og útlán í mynd A.

Kelda: Hagstovan.

Skuldin hjá føroyskum húsarhaldum og vinnufyritøkum er ikki høg, sammett við privata skuld í øðrum londum í vesturheiminum. Bruttoskuldin hjá føroyskum húsarhaldum kann metast til um 50% av BTÚ. Bruttoskuldin hjá húsarhaldum í Danmark og Noregi er til dømis um 85% av BTÚ, og í Íslandi er húsarhaldsskuldin um 70% av BTÚ.

Gongdin í útflutningsvinnunum

Mynd 3 vísir gongdina í tøkuni av aldum laksi síðstu árini. Á myndini sæst tøkan av alifiski í kruvdari vekt. Tøkan av alifiski er vaksin úr um 40 tús. tonsum í 2009 til væntað omanfyri 100 tús. tons í 2025. Prísirnir á aldum laksi eru lækkaðir munandi í ár frá umleið 10 EUR fyri kg. við ársbyrjan til umleið 6 EUR fyri kg. í september sambært *Fish Pool* vísitalinum. Síðstu vikurnar eru prísirnir tó hækkaðir aftur (sí mynd 4).

Orsøkin er, at útflutningurin av rundum laksi úr Noregi er vaksin munandi, tí ein koppseting er, sum virkar móti vetrarsári. Tí er útboðið á feskfiskamarknaðinum vaksið munandi, sum hevur trýst altjóða prísirnir á laksi. Flestu forsagnir og forward-prísir benda á, at prísirnir á laksi fara at hækka aftur í 2026. Vøksturin síðstu árini í útflutningsvirðinum á alilaksi er bæði komin av góðum prísum summi ár og av vaksandi tøku.

Síðani 2022 hava prísirnir sambært *Fish Pool* vísitalinum verið millum 8 og 8,5 EUR fyri kg. (ársmiðal), sum tó er lækkað til um 6,5 EUR fyri kg. í miðal í 2025. Síðani 2012 er miðalprísurin á útfluttum aldum laksi úr Føroyum hækkaður úr um 31 kr. fyri kg. í um 66 kr. fyri kg. í miðal í 2024 og um 58 kr. fyri kg. í miðal higartil í 2025. Havast skal í huga, at aðrir prísir og framleiðslukostnaðurin somuleiðis eru hækkaðir sera nógv hetta sama tíðarskeið. Síðstu árini hevur prísurin á laksi verið munandi hægri frá umleið desember til út á várið, meðan prísirnir eru lækkaðir summarmánaðirnar.

Mynd 3
Tøka av aldum laksi í tús. tonsum, kruvd vekt, skift á ár, 1996 til 2025



Viðm.: Tøkan er í kruvdari vekt í tonsum.
Kelda: Hagstovan og metingar fyri 2024 og 2025 (metingarnar stava frá Búskaparráðnum og Avrik sp/f).

Gongdin í *Fish Pool* vísitalinum síðani 2019 er víst í mynd 4 niðanfyri. Á myndini sæst stóra lækkingin í prísum í 2025. Eftirspurningurin eftir aldum laksi og øðrum dygdargóðum matvørum er vaksandi um tað mesta av heiminum, og millum annað tí verður mett, at útlit eru til, at altjóða laksaprísir kunnu hækka aftur í 2026.

Mynd 4
Fishpool vísitalið í EUR/kg., býtt á vikur, 2019 til viku 38 í 2025, foreward prísir til triðja ársfjórðing 2026



Kelda: Fish Pool Index.

Gongdin í uppsjóvarvinnuni hevur verið ein orsøk til vøksturin í føroyska búskapinum síðstu um 10 árini. Nøgdirnar og kvoturnar eru vaksnar nógv, og prísirnir eru eisini hækkaðir. Føroysku kvoturnar av sild og makreli minkaðu tó í 2024 og er aftur minkaðar í 2025. Somuleiðis minkaði toskakvotan í Barentshavinum í 2024 og aftur í 2025. Óvissa er sjálvsagt um kvoturnar næstu árini, men roknað verður ikki við stórum minkingum aftrat teimum minkingum, sum hava verið í 2024 og 2025.

Samlaða útflutningsvirðið á uppsjóvar- og botnfiski er tó vaksið í 2025, orsakað av sera góðum prísum, serliga á toski og makreli. Fíggjarmálaráðið roknar við, at ískoytið til vøksturin frá útflutningsvinnunum hækkar nakað í 2026.

Avreiðingarnar av botnfiski, fiskaður undir Føroyum, eru framvegis smáar. Fyri toskastovnin á Landgrunninum síggjast tó ávís tekin um batar sambært Havstovuni. Toskastovnurin á Landgrunninum hevur verið undir søguligum lágmarki síðani 2004. Í 2018 var toskastovnurin oman fyri lágmarksstødd av gýtingarstovninum, men síðan 2019 hava stovnsmetingarnar víst, at gýtingarstovnurin er aftur undir hesum marki.

Í nýggjastu stovnsmetingini hjá ICES (nov. 2024) eru tó tekin um bata í mun til undanfarnu tvey árini, tá ið ICES mælti til ongan toskafiskiskap á Landgrunninum. Við hóskiligum veiðitrýsti er sambært ICES væntandi, at stovnurin kemur upp um minstamarkið fyri gýtingarstovnin í 2026.

Samanumtikið eru møguliga útlit til frægari fiskiskap eftir botnfiski undir Føroyum næstu 1-2 árini. Fiskivinnan á heimaleiðunum, sum serliga roynir eftir botnfiski, hevur havt minkandi týdning í búskapinum síðstu um 15 árini.

Gongdin á arbeiðsmarknaðinum

Arbeiðsmarknaðurin er framvegis væl fyri. Arbeiðsloysið hevur verið støðugt um 1% av arbeiðsmegini í út við tvey ár, og skrásetta arbeiðsloysið var um 1% í juli í ár. Tað lægsta

arbeiðsloysið, sum er skrásett í Føroyum, var 0,6% á sumri 2023. Talið av starvsfólkum í innlendska búskapinum er hækkað úr um 23 tús. í 2013 í um 30 tús. miðskeiðis í 2025.

Á mynd 5 niðanfyri sæst gongdin í arbeiðsloysinum og í talinum av starvsfólkum í innlendska búskapinum. Arbeiðsloysið er lágt í øllum landinum, tó at arbeiðsloysið er nakað hægri í Suðuroy (2,5%) enn aðrastaðni í landinum.

Mynd 5
Árstíðarjavnað arbeiðsloysi í % av arbeiðsfjøld og løntakarar, jan.-2010 til aug.-2025



Kelda: Hagstovan.

Síðsta árið eru færri útlendingar komnir til Føroyar at arbeiða, um hugt verður eftir starvsfólkum, sum ikki hava bústaðartilknýti sambært uppgerð hjá Hagstovuni. Talið av starvsfólkum uttan bústaðartilknýti var um 1.000 fólk miðskeiðis í 2019. Síðani er tað vaksið til um 1.900 fólk miðskeiðis í 2025. Fyri at hava bústaðartilknýti skulu fólk hava búð helvtina av lívinum ella 7 út av 10 samanhangandi árum í Føroyum eina ferð í lívinum.

Útlendsku starvsfólkini forða fyri størri lønartrýsti og forða fyri størri fløskuhálsum á arbeiðsmarknaðinum, serliga innan handverks- og tænastuvinnuna. Útlendsku starvsfólkini eru í løtuni um 7% av samlaðu starvsfólkunum í landinum. Til sammetingar eru útlendsku løntakararnir í Danmark og Íslandi ávikavist um 13 og 23% av øllum løntakarunum. Í USA, Bretlandi og Týsklandi eru útlendsku løntakararnir somuleiðis út við 20% av samlaðu løntakarunum.

Nógv bendir á, at gongdin við fleiri útlendskum løntakarum í Føroyum fer at halda fram næstu árini, millum annað orsakað av stórum tørvi á arbeiðsmegi innan ávísar vinnur. Sostatt bendir nógv á, at tørvurin á arbeiðsmegi í Føroyum og í øðrum framkomnum londum er bygnaðarligur og fer at halda fram næstu nógvu árini.

Vinnutíttleikin er sera stórur í Føroyum, samanborið við í øðrum londum. Vinnutíttleikin er arbeiðsfjøldin í % av fólkinum. Vinnutíttleikin í aldursbólkinum 15-74 ár er um 85% tilsamans fyri kvinnur og menn. Vinnutíttleikin í Føroyum er nógv tann hægsti í Europa, bæði hjá kvinnum og monnum og fyri allar aldursbólkar.

Munurin í vinnutíttleikanum í Føroyar og øðrum londum í Evropa er vaksin síðstu árini. Fyri nøkrum árum síðani var lítil munur á vinnutíttleikanum í Føroyum og Íslandi, men nú er vinnutíttleikin munandi hægri í Føroyum enn í Íslandi. Eitt eyðkenni fyri vinnutíttleikan í Føroyum er, at minni munur er á vinnutíttleikanum millum kynini enn í øðrum londum í Evropa. Harafturat er vinnutíttleikin stórur millum ung upp til 30 ár og eldri omanfyri 60 ár.

Mynd 6

Lønargjaldingar, trendur, býttar á mánaðr, jan. 2010 til aug. 2025



Viðm.: Mynd A vísir lønargjaldingar, trend, tilsamans jan. 2010 til aug. 2025.
Mynd B vísir lønargjaldingar, trend, í fýra høvuðsvinnugreinum jan. 2010 til aug. 2025. Vísital jan. 2010 = 100.
Kelda: Hagstovan.

Lønargjaldingar í Føroyum hækka í løtuni út við 8% árliga. Lønargjaldingar tilsamans og í ymiskum høvuðsvinnugreinum síggjast eisini í mynd 6. Síðani 2010 hevur størsti vøksturin í lønargjaldingum verið í fiskiveiðu, aling og byggivinnuni. Síðsta árið eru lønargjaldingarnar serliga vaksnar innan botnfiskiveiðu, gisting og matstovuvinnu og ymiskar tænastuvinnur.

Eftirspurningur og húsarhaldsnýtsla

Frá 2014 til 2022 vaks húsarhaldsnýtslan javnt og støðugt. Hagtøl vísa tó, at privati eftirspurningurin er vaksin lítið síðstu umleið trý árini. Orsakirnar eru helst prísvøksturin innan matvørur, brennievni og rentuhækkingarnar, sum tók dik á seg í 2022. Nógv bendir á, at húsarhald hava tillagað sína nýtslu og minkað nýtsluna av øðrum vørum og tænastum og í størri mun keypa bíligari vørur nú.

Útlit eru til, at realinntøkan hjá flestu húsarhaldum fer at hækka næstu 1-2 árini, orsakað av høgum lønarhækkingum á arbeiðsmarknaðinum, samstundis sum prísvøksturin er á vanligum støði. Harafturat hevur skattaumleggingin fyri árini 2024 og 2025 givið flestu húsarhaldum hægri tøka inntøku. Samanumtikið talar tað fyri, at privata nýtslan kann vaksa næstu 1-2 árini.

Prísvøksturin er lækkaður síðani 2023, og roknast kann við støðugum prísvøkstri næstu 1-2 árini. Lønarhækkingar eru avtalaðar fyri 2025 á privata og almenna arbeiðsmarknaðinum, sum eru hægri enn væntaði prísvøksturin. Tað talar tilsamans fyri, at tøka inntøkan og keypsorkan hjá vanligum

húsarhaldum fer at hækka næstu 1-2 árini. Lága skuldin millum føroysk húsarhald talar eisini fyri, at húsarhaldsnýtslan kann vaksa næstu 1-2 árini.

Á mynd 7 sæst vísital fyri smásølu í føstum prísum fyri ymiskar vørubólkar. Myndin vísir, at privati eftirspurningurin vaks í 2020 og 2021 undir koronufarsóttini, og at eftirspurningurin síðani er minkaður nakað aftur. Viðvíkjandi gerandisvørum og øðrum ódrúgvum vørum er eftirspurningurin ikki vaksin nógv síðstu tvey árini. Smásøla er søla hjá handlum til privata nýtslu og lýsir gongdina í umsetninginum og broytingarnar í seldum mongdum.

Mynd 7

Smásøla í føstum prísum, býtt á vørubólkar og ársfjórðingar (trendur), 2005 til 2025



Kelda: Hagstovan.

Sambært brúkaraprístalinum hjá Hagstovuni var prísvøksturin 1,1% frá august 2024 til august 2025. Prísvøksturin á mati og drykkjuvørum er tó framvegis stórur, samanborið við aðrar vørur og tænastur. Brúkaraprístalið hækkaði ógvusliga í 2022, sum í stóran mun kom av krígnum í Ukraina og harav hækkandi olju- og matvøruprísum, sí mynd 8.

Mynd 8

Brúkaraprístalið, 1. ársfjórðing 2001 til 3. ársfjórðing 2025, býtt á ársfjórðingar, vísital 2001 = 100



Kelda: Hagstovan.

At prísvøksturin er lækkaður aftur síðstu tvey árini, kemur í stóran mun av, at prísirnir á orku og brennievni eru lækkaðir og av lægri rentum, meðan mat- og gerandisvørurnar framvegis dýrka. Útlit eru til, at prísvøksturin verður hóvligari næstu 1-2 árini, sammett við undanfarnu 1-2 ár. Í Evropa og USA verður roknað við prísvøkstri í miðal á 2-3% í 2024 og í 2025.

Konjunkturvísitalið er víst í mynd 9. Konjunkturvísitalið er hækkað úr -8 í juni 2024 til 8 í síðstu kanning, sum var í juni 2025. Vísitalið lækkaði samanlagt úr 9 til 8 í síðstu kanning. Brúkarakanningin vísir, at føroysku húsarhaldini eru ávirkað av gongdini síðstu trý árini við kríggi í Evropa, stórum prísvøkstri og rentuhækkingum.

Húsarhaldini meta sum heild, at búskaparstøðan í Føroyum og fíggjarstøða fara at versna eitt vet næstu 12 mánaðirnar. Konjunkturkanningin vísir eisini, at handilsvinnan hevur betri vónir, og at vinnan væntar, at sølan fer at vaksa næsta árið. Handilsvinnan sigur eisini, at sølan síðsta árið er hilnast nakað betri.

Mynd 9

Samanvigað konjunkturvísital og vísital fyri húsarhald, jan.-2006 til juli-2025



Kelda: Hagstovan.

Gongdin í fólkatalinum

Hagtølini í sambandi við fólkatal og -flytingar stava frá Hagstovuni og landsfólkayvirlitinum. Fólkatalið fevnir um øll, sum eru skrásett at búgva fast í landinum, undir hesum sjálvsagt eisini tilflytarar, sum flyta til landið at arbeiða og fáa fastan bústað her í tí sambandi. Fólkatalið í Føroyum frá 1985 til 2025 sæst í mynd 10.

Mynd 10
Fólkatal í Føroyum 1. januar, 1985-2025, meting fyri 2026



Kelda: Hagstovan.

Fólkatalið veksur í løtuni um 0,7% um árið, sum svarar til út við 400 fólk. Vøksturin í fólkatalinum er eitt vet størri nú, sammett við einum ári síðani. Síðsta árið er fráflytingin minkað, og burðaravlopið er hækkað nakað.

Mynd 11
Broytingar í fólkatalinum, 1970 til 2025



Viðm.: Tølini fyri árið 2025 eru metingar grundaðar á jan.-juni 2025.
Kelda: Hagstovan.

Hagtølini yvir ríkisborgaraskap hjá persónum í Føroyum og sokallað bústaðartilknýti benda á, at síðstu fýra árini er tilflytingin broytt frá í stóran mun at vera føroyingar, sum flyta til landið, til at vera útlendsk arbeiðsmegi, sum kemur til. Síðstu fýra árini eru í miðal um 150 fólk (netto) við bústaðartilknýti flutt úr Føroyum, og í miðal eru um 400 fólk (netto) uttan bústaðartilknýti flutt til landið.

Mynd 12

Fráflyting og tilflyting til Føroyar og nettoflyting*, jan.-2007 til juli-2025



* Strikan við nettoflyting vísir nettoflyting samanlagt fyri síðstu 12 mánaðirnar fyri hvønn mánaða.
Kelda: Hagstovan.

Samlaða tilflytingin netto síðani 2014 er tekin um, at stór framgongd hevur verið á arbeiðsmarknaðinum og í búskapinum yvirhøvur. Síðstu áratíggjuni hava broytingar í fólkaflytingini til og úr landinum samsvarað væl við umstøðurnar á arbeiðsmarknaðinum og í búskapinum sum heild.

Frá 2014 til 2021 vaks talið á donskum ríkisborgarum í Føroyum samsvarandi við vøksturin í fólkatalinum. Síðani 2022 hevur gongdin heldur verið, at talið á donskum ríkisborgarum hevur verið at kalla óbroytt, meðan talið øðrum ríkisborgarum er vaksið. Tað vísir, at síðstu fýra árini er fólkatalið vaksið av útlendskari arbeiðsmegi, sum er komin til landið.

Hagtøl yvir flytingina millum Føroyar og útlond vísa, at í 2024 komu um 48% av tilflytarunum til Føroyar úr Danmark. Um 8% komu úr øðrum Norðurlondum, um 27% komu úr øðrum londum í Evropa, og um 12% komu úr Asia. Tað bendir eisini á, at størri partur av tilflytingini nú eru útlendingar, sum koma til Føroyar at arbeiða. Undanfarin ár hevur størri partur av tilflytingini verið føroyingar, sum fluttu til Føroyar úr Danmark.

Fólkatalið er vaksið síðani 2014 og er nú um 55 tús. Fólkavøksturin er vaksin nakað síðsta hálva árið, men er enn nakað minni enn árini 2018 til 2022. Mynd 11 vísir árligu broytingarnar í fólkatalinum síðani 1970 við mettum tølum fyri 2025, og mynd 12 vísir nettoflyting til landið býtt á mánaðir.

Fólkavøksturin, sum hevur verið síðani 2014, hevur ikki verið javnt stórur um alt landið. Fólkatalið á Sandoynni og Suðuroynni hevur heldur staðið í stað, meðan at kalla allur fólkavøksturin hevur verið aðrastaðni í landinum. Síðstu tvey árini hevur tó verið stórur fólkavøkstur á Sandoynni. Størsti parturin av fólkavøkstrinum er í miðøkinum í landinum, sum sæst í talvu 1.

Talva 1
Fólkatalið býtt á øki í landinum, 1. aug. 2024 til 1. aug. 2025

Øki í landinum	Fólkatal 1. aug. 2024	Burðaravlop	Nettoflyting	Fólkatal 1. aug. 2025	Broyting í tali	Broyting í %
Norðuroyggjar	6.463	20	7	6.490	27	0,4
Eysturoy	12.562	65	91	12.718	156	1,2
Tórshavnarøkið*	21.431	74	129	21.634	203	1,0
Streymoyarøkið annars	4.981	17	-19	4.979	-2	0,0
Vágaøkið	3.466	10	-16	3.460	-6	-0,2
Sandoyarøkið	1.301	-12	45	1.334	33	2,5
Suðuroy	4.565	-16	-18	4.531	-34	-0,8
Alt landið	**54.769**	**158**	**219**	**55.146**	**377**	**0,7**

*Tórshavn, Hoyvík og Argir.
Kelda: Hagstovan.

Viðurskifti við útlond, handils- og gjaldsjavni

Á mynd 13 sæst gongdin í føroyska inn- og útflutninginum síðan 1988 við mettum tølum fyri 2025. Myndin vísir, at innflutningurin er nógv ávirkaður av búskaparligu sveiggjunum í samfelagnum og serliga av innlendis eftirspurninginum. Harafturat ávirka oljuprísir innflutningin. Stórur innflutningur av skipum og flogførum ella stórar íløgur okkurt árið kunnu eisini ávirka innflutningin nógv.

Mynd 13
Inn- og útflutningur, mia. kr., 1988 til 2025



Viðm.: Handilsjavnin fevnir bara um vørur; tænastur eru sostatt ikki íroknaðar handilsjavnan. Metingin fyri 2025 byggir á tíðarbilið januar-juli 2025 sammett við somu mánaðir í 2024.
Kelda: Hagstovan.

Hagtøl yvir innflutning higartil í ár benda á, at innflutningurin helst veksur 4-5% í ár, sammett við í 2024. Ein orsøk er, at prísurin er hækkaður á matvørum. Útflutningurin er vaksin støðugt síðstu árini, tó at hann minkaði nakað í 2024. Vøruútflutningurin er vaksin úr um 7 mia. kr. í 2015 í mettar um 13 mia. kr. í 2025.

Mynd 14

Rakstrarviðskifti gjaldsjavnans í mió. kr., 1998-2024



* Tølini fyri 2023 og 2024 eru fyribils metingar og skulu lesast við fyrivarni.
Kelda: Hagstovan.

Síðstu nógvu árini hava avlop verið á føroyska gjaldsjavnanum, sí mynd 14. Uppgerðir av gjaldsjavnanum eru tøkar til 2023. Við støði í handilsjavnanum fyri 2024 ber til at meta leysliga um gjaldsjavnan, hóast metingarnar eru óvissar og skulu lesast við fyrivarni. Hagtølini benda á, at stór avlop hava verið á gjaldsjavnanum síðani 2013. Heldur verandi gongd fram, vera eisini stór avlop í 2024 og 2025.

Avlopini á gjaldsjavnanum síðani 2013 eru í stóran mun komin av, at býtislutfallið í uttanríkishandlinum er betrað. Hetta merkir, at prísir á útfluttum vørum (serstakliga á aldum laksi og uppsjóvarfiski) eru hækkaðir meiri í miðal, sammett við prísirnir á innfluttum vørum, til dømis á brennievni og á innfluttum nýtsluvørum. Í 2025 hevur støðan kortini verið hon, at laksaprísir eru lækkaðir munandi, meðan prísirnir á brennievni ikki eru broyttir nógv. Hinvegin hava prísirnir verið høgir á makreli og toski.

Heimsbúskapurin

Útlit eru til vøkstur í heimsbúskapinum næstu 1-2 árini á um 3% um árið. Altjóða rentustøðið er lækkað í 2024 og 2025, sum hevur stimbrað eftirspurningin og íløguvirksemið í fleiri londum. Harafturat er fíggjarpolitikkurin í Evropa nú meira stimbrandi aftur, millum annað tí at stórar íløgur verða gjørdar í verju, trygd, tilbúgving, undirstøðukervið og grøna orkuskiftið. Lægri oljuprísir og lægri prísvøkstur yvirhøvur hava økt tøku realinntøkuna og stimbrað eftirspurningin í Evropa og USA.

Sum vanligt er, er óvissa um gongdina í heimsbúskapinum og um forsagnirnar sum heild. Størstu óvissurnar snúgva seg um handilspolitikkin hjá stjórnini í USA og frá spenningum og ófriði millum heimsveldini. Handilspolitikkurin hjá stjórnini í USA hevur við sær óvissu um grundleggjandi

umstøður, treytir og útlit fyri altjóða handli og búskaparvøkstri næstu árini. Eisini er sannlíkt, at tollhækkingarnar í USA fara at skunda undir prísvøksturin í USA og lutvíst eisini í Evropa.

Talva 2
Árligur vøkstur í BTÚ í føstum prísum 2022-2026 býtt á lond og øki

*% um árið í føstum prísum**	2022	2023	2024	2025	2026
USA	2,5	2,9	2,8	1,8	1,5
Evruøkið	3,5	0,4	0,8	1,2	1,0
Týskland	3,1	1,8	-0,5	0,3	1,1
Bretland	4,8	0,4	1,1	1,4	1,0
Danmark	1,5	2,5	2,1	2,3	1,5
Heimsbúskapurin	3,6	3,5	3,3	3,2	2,9

*Uppgerðirnar eru metingar og forsagnir og skulu lesast við fyrivarni.
Kelda: Nationalbanken, Udsigter for dansk økonomi, 23. sept. 2025, og OECD, Interim Economic Outlook, 23. sept. 2025.

Fleiri lond, millum annað ES og Bretland, hava gjørt avtalur við USA um treytirnar fyri handli næstu árini. Avtalurnar geva eina ávísa vissu um handilstreytirnar næstu árini og um, hvør tollur verður galdandi. Avtalurnar hava tó allar við sær, at tollurin hækkar munandi á vørum, sum verða innfluttar til USA. Enn er tó eftir at samráðast um fleiri smálutir í handilsavtalunum millum USA og onnur lond.

Tollhækkingarnar í USA fara samanumtikið at darva búskaparvøkstri fyrst og fremst í USA, men ávirkanirnar fara eisini at síggjast aðrastaðni. Sannlíkt verða ávirkanirnar stórar fyri smærri lond, sum útflyta nógv til USA, og sum í minni mun fáa útflutt vørur til onnur lond. Ávirkanirnar av tollhækkingunum í USA fara at síggjast, sum frá líður, næstu árini, so hvørt sum brúkarar og fyritøkur laga seg til nýggju umstøðurnar.

Tekin síggjast um, at búskaparvøksturin, sum var í USA í 2024, er hæsaður av í ár, og forsagnir um vøksturin næstu 1-2 árini eru lækkaðar. Framgongdin á arbeiðsmarknaðinum í USA er hæsað av síðstu mánaðirnar. Hinvegin hevur framgongd verið í fleiri londum í Evropa síðstu mánaðirnar, og útlitini fyri búskaparvøkstri í Evropa eru batnað síðstu mánaðirnar.

Nevnast kann, at at vørur úr ES, Noregi og Íslandi fáa álagt hægri toll (15%) enn vørur úr Føroyum (10%), sum kann geva vørum úr Føroyum ein kappingarfyrimun. Harafturat er samlaði marknaðurin í Evropa ein munandi størri marknaður fyri vørur úr Føroyum enn marknaðurin í USA.

Í talvu 2 omanfyri síggjast metingar frá IMF um væntaða vøksturin í ymiskum økjum og londum í 2025 og 2026. Í talvuni sæst, at roknast kann við vøkstri á 1-2% í 2025 og 2026 í fleiri av størstu marknaðunum fyri føroyskan útflutning.

Prísvøksturin í USA er minkaður síðsta árið, men hann er framvegis omanfyri málið hjá miðbankanum, sum er 2% um árið. Eins og nevnt, kann roknast við, at tollhækkingarnar fara at stimbra brúkaraprísir í USA næstu tíðina. Prísvøksturin í Evropa er eisini lækkaður síðsta árið og samsvarar í løtuni við málið hjá miðbankanum á 2% um árið. Síðstu mánaðirnar er prísvøksturin hækkaður innan matvørur og á tænastum. Tað hevur síðani havt við sær, at samlaði prísvøksturin ikki er lækkaður síðstu mánaðirnar.

Metingar hjá IMF og OECD benda á, at búskaparvøksturin í Evropa verður um 1% í 2025 og 1-2% í 2026. Roknað verður við, at privata nýtslan fer at vaksa í Evropa í 2025 og í 2026, millum annað orsakað av hægri reallønum.

Arbeiðsloysið í evruøkinum er um 6%, sum er metlágt í Evropa síðstu 25 árini. Roknað verður við støðugum arbeiðsloysi í Evropa næstu 1-2 árini. Nakað av muni er framvegis á arbeiðsloysinum í Evropa, tó at munurin er minni nú enn fyri nøkrum árum síðani. Arbeiðsloysið í Týsklandi og Niðurlondum er til dømis um 4%, meðan arbeiðsloysið í Spania og Finnlandi er um 10%.

Forsagnir benda á, at búskapurin í USA veksur um 2% í 2025 og 1-2% í 2026 í føstum prísum. Arbeiðsloysið í USA er framvegis lágt á um 4%. Fíggjarpolitikkurin í USA væntast harafturat ikki í sama mun at stimbra búskaparvøksturin næstu 1-2 árini eins og undanfarin ár.

Mynd 15 vísir leiðandi renturnar í Evropa og USA síðani ársbyrjan 2022 og rentuforsagnir til ársenda 2026. Flestu forsagnir um rentu siga, at miðbankin í USA sannlíkt fer at lækka renturnar nakrar ferðir seinni í 2025 og aftur í 2026. Sannlíkt verður bara talan um smærri rentulækkingar.

Evropeiski miðbankin hevur boðað frá, at leiðandi renturnar eru tætt við at vera hóskandi, og at roknast kann ikki við stórum rentubroytingum. Hóast rentustøðið nú er hægri enn í 2021, er rentustøðið samanumtikið framvegis ikki høgt, um hugt verður eftir miðalrentum síðstu um 70 árini.

Mynd 15

Leiðandi rentur, býtt á lond, øki og ársfjórðingar, 2022-2025, rentuforsøgn til okt. 2026



Kelda: OECD Economic Outlook, Interim Report, 23. september 2025.

Almenn fíggjarmál

Her verður stutt hugt at gongdini í úrslitinum hjá landskassanum og tí almenna sum heild síðstu árini. Hugt verður eisini stutt eftir skuldarstøðuni hjá landinum. Mynd 16 vísir gongdina í inntøkum og útreiðslum hjá landskassanum og RLÚ-úrslit síðani 1997 við mettum tølum fyri 2025 og tølum úr uppskotinum til fíggjarlóg fyri 2026. Á myndini sæst, at landið væntandi hevur hall í 2025 á um 180 mió. kr., sum er eitt vet verri enn úrslitið í 2024.

Mynd 16
Úrslit landskassans, mió. kr., 1997 til 2026



Viðm.: Tølini fram til og við 2024 eru roknskapartøl. Tølini fyri 2025 eru mett tøl. Tølini fyri 2026 eru úr uppskotinum til fíggjarlóg.
Kelda: Gjaldstovan og Fíggjarmálaráðið.

Í 2024 hevði landskassin hall á um 170 mió. kr., og Fíggjarmálaráðið roknar við, at landskassin fer at hava hall á um 180 mió. kr. í 2025. Úrslitið í fíggjarlógaruppskotinum fyri 2026 er eitt hall á um 170 mió. kr. Á mynd 16 sæst, at útreiðslurnar hava verið meira støðugt hækkandi síðani 1997, meðan inntøkurnar eru vaksnar meira óstøðugt.

Inntøkurnar hjá landinum fylgja í størri mun sveiggjunum í búskapinum, meðan útreiðslurnar vaksa meira javnt og óheft at gongdini í búskapinum annars. Fíggjarmálaráðið ger vart við, at vøksturin í rakstrarútreiðslunum kann ikki vera munandi størri enn vøksturin í inntøkunum í longri tíð, uttan at tað ávirkar kredittvirðið hjá landinum og møguleikarnar og rásarúmið at reka sjálvstøðugan fíggjarpolitikk.

Mynd 17 vísir langfreistaðu skuld landskassans, íroknað skuldina hjá felagnum P/F Eystur- og Sandoyartunlar síðani 2017, og innistandandi hjá landsstýrinum í Landsbankanum (gjaldførið). Lánsbrævaskuldin hjá landinum var um 5 mia. kr. miðskeiðis í 2025.

Landskassin hevur lítla skuld, sammett við flestu onnur lond í vesturheiminum. Bruttoskuldin hjá landinum kann metast til um 18% av BTÚ í 2025. Harafturat hava kommunurnar um 2 mia. kr. í bruttoskuld, sum svarar til um 7% av BTÚ í 2025. Almenna felagið P/F Eystur- og Sandoyartunlar hevur skuld á um 8% av BTÚ, og landið hevur veitt felagnum ferðsluveðhald og stuðlar felagnum við rakstrarstuðli á 17 mió. kr. í 2025.

Mynd 17
Langfreistaða skuld landskassans* og innistandandi í Landsbankanum, mió. kr., 1997 til 2025



* Skuldin hjá almenna felagnum P/F Eystur- og Sandoyartunlar er íroknað landskassaskuldina síðani 2017.
Kelda: Landsbankin og Gjaldstovan.

Sambært leiðreglum fyri uppgerð av almennari skuld í londunum í ES (EGS-skuld) og sambært Landsbankanum verður skuldin hjá P/F Eystur- og Sandoyartunlar roknað sum almenn skuld, tí at landið veðheldur fyri skuldina og stuðlar felagnum við rakstrarstuðli á 17 mió. kr. í 2025. Íroknað skuldina hjá tunnilsfelagnum, kann almenna bruttoskuldin metast til 30-35% av BTÚ.

Almenna bruttoskuldin í londunum í ES er um 90% av BTÚ í miðal, meðan hon er 25-30% av BTÚ í Danmark og um 50-55% av BTÚ í Íslandi. Her eigur at verða nevnt, at smá lond, har stór sveiggj kunnu vera í búskapinum, eru meira viðbrekin og hava tí ikki sama rásarúm sum størri lond til at hava nógva skuld í prosent av BTÚ.

Mynd 18
Nettoskuld landskassans* (langfreistað skuld frádrigið gjaldføri), mió. kr., 1997 til 2025



* Skuldin hjá almenna felagnum P/F Eystur- og Sandoyartunlar er íroknað landskassaskuldina síðani 2017.
Kelda: Landsbankin og Gjaldstovan.

Mynd 18 vísir nettoskuldina hjá landskassanum síðani 1997, íroknað skuldina hjá felagnum P/F Eystur- og Sandoyartunlar frá 2017. Nettoskuldin er í hesum føri uppgjørd sum langfreistað skuld, frádrigið gjaldføri hjá landinum. Á myndini sæst, at nettoskuldin hjá landinum er minkað síðani

2017. Hækkingin í 2017 kom av lántøkuni hjá tunnilsfelagnum. Hækkingin í 2020 kom av láninum, sum var tikið í tíðini við korona, og hækkingin í 2024 kom av láninum, sum varð tikið tá og bleiv brúkt lutvíst til at rinda lán aftur í 2025.

Kredittvirðið hjá landinum er framvegis gott

Kredittmetingarfyrtøkan Moody's dagførdi sína skuldarmeting (rating) av lánførinum hjá landsstýrinum í september 2025. Samlaða metingin frá Moody's av landsstýrinum er óbroytt aa2 við støðugum útlitum fyri metingina. Skuldarmetingin aa2 er triðhægsta meting, sum Moody's letur. Til sammetingar kann verða nevnt, at Frakland og Bretland hava metingina aa3, sum er eitt metingarstig lægri enn Føroyar hava.

Landsstýrið hevur fyrr í ár tikið tvey nýggj lánsbrævalán. Eitt lán varð tikið í mai og var uppá 1.320 mió. kr. Hendan upphæddin varð brúkt til at rinda aftur eitt lán, sum fall til gjaldingar í juni í ár. Í juli 2024 varð eitt 15 ára lán á 900 mió. kr. tikið, og tað lánið varð hækkað við 350 mió. kr. í januar í ár. Lánini vórðu brúkt til at rinda aftur eitt lán á 1.645 mió. kr., sum skuldi afturrindast í juni í ár. Harafturat fíggjar lántøkan hallið hjá landskassanum í 2023 og 2024, umframt at partur av láninum fer til gjaldføri landsins.

Lánsbrævaskuldin er miðskeiðis í 2025 um 5 mia. kr. umframt skuldina hjá felagnum P/F Eystur- og Sandoyartunlar á um 2,3 mia. kr. Miðalgjaldførið hjá landinum higartil í ár er um 4,9 mia. kr.

Roknað verður ikki við rentuhækkingum næstu 1-2 árini, men rentustøðið er hækkað nógv síðani 2022. Roknast kann við, at rentuútreiðslurnar hjá landinum fara at vaksa nakað næstu árini, tí at skuld verður endurfíggjað til hægri rentu. Harafturat fer skuldin at vaksa nakað av væntaða hallinum hjá landinum í 2025 og 2026.

Uppskotið til fíggjarlóg fyri 2026

Talvan niðanfyri vísir inntøkur, útreiðslur og RLÚ-úrslitið í fíggjarlógaruppskotinum fyri 2026. Í talvuni niðanfyri eru nettorenturnar íroknaðar á inntøkusíðuni, og løgujáttanir eru íroknaðar útreiðslunum tilsamans.

Høvuðstøl í fíggjarlógaruppskotinum fyri 2026

Mió. kr.	**2026**
Inntøkur tilsamans	7.547
Útreiðslur tilsamans	7.720
RLÚ-úrslit	**-173**

Framrokningar av inntøkum og útreiðslum

Stóru inntøkukeldurnar, vanligur landsskattur og meirvirðisgjald, verða í fyritreytunum settar at vaksa varisliga um 4% í 2026. Eftir hetta er framroknað við mettum vøkstri í føstum prísum.

Inntøkur landskassans í 2026

Inntøkurnar eru mettar til 7.547 mió. kr. netto í 2026 (íroknað mettar rentuútreiðslur á um 22 mió. kr. netto). Talvan niðanfyri vísir inntøkurnar í fíggjarlógaruppskotinum fyri 2026.

Meting av inntøkum landskassans í 2025 og 2026

mió. kr.	**R-2024**	**FL-2025**	**Meting 2025**	**FLU-2026**	**Munur frá FL25 til FLU26**
Rentur	19	-23	-9	-22	4,4%
Skattainntøkur	3.284	3.390	3.459	3.411	0,6%
Avgjøld og tollur	3.577	3.742	3.704	3.891	4,0%
Ymsar inntøkur	75	160	175	153	-4,4%
Flytingar	-433	-429	-423	-428	0,2%
Heildarveiting o.t.	592	567	567	542	-4,4%
Tilsamans	**7.114**	**7.407**	**7.473**	**7.547**	**1,9%**

Útreiðslur landskassans í 2026

Útreiðslurnar verða mettar til 7.720 mió. kr. í 2026. Harav eru rakstrarútreiðslurnar 7.153 mió. kr., og løgur og løgukendar útreiðslur eru 567 mió. kr.

Talvurnar niðanfyri vísa útreiðslurnar hjá landskassanum útgreinaðar á rakstur og løgur.

Meting av útreiðslum landskassans í 2025 og 2026

mió. kr.	R-2024	FL-2025	Meting 2025	FLU-2026	Munur frá FL25 til FLU26
Rakstur	6.590	6.909	6.908	7.153	3,5%
Løgur og løgukendar útr.	695	619	743	567	-8,4%
Tilsamans	**7.285**	**7.528**	**7.651**	**7.720**	**2,6%**

Útreiðslur landskassans, býtt á játtanarsløg, 2024 til 2026

mió. kr.	R-2024	FL-2025	FLU-2026	Munur frá FL25 til FLU26
Rakstrarjáttan	4.351	4.603	4.734	2,9%
Lógarbundin játtan	1.912	1.999	2.094	4,7%
Stuðulsjáttan	437	438	444	1,3%
Løgujáttan	585	488	448	-8,2%
Tilsamans	**7.285**	**7.528**	**7.720**	**2,6%**
Løgur og løgukendar útr.	695	619	567	-8,4%
Rakstrarútr. tils.	**6.590**	**6.909**	**7.153**	**3,5%**

Løgur í 2026

Løgukarmurin í uppskotinum til fíggjarlóg fyri 2026 er 448 mió. kr. umframt løgukendar útreiðslur (stuðul til løgur) á um 119 mió. kr. Óbrúktar løgujáttanir eru eisini frá 2025, sum hava átekning soleiðis, at til ber at framflyta tær til fíggjarárið 2026. Roknast kann við, at um 230 mió. kr. av óbrúktum løgujáttanum verða fluttar til fíggjarárið 2026.

Talvan niðanfyri vísir, hvussu løgukarmurin á 448 mió. kr. og játtanirnar til løgukendar útreiðslur (løgustuðul) í uppskotinum til fíggjarlóg fyri 2026 eru býttar á greinar og løgur.

Løguætlanin fyri 2026 ***(túsund kr.)***	
Løgur § 1. - § 18. Tilsamans	**566.800**
§ 1. Løgtingið	**0**
§ 2. Løgmansfyrisitingin	**104.000**
Umbygging í Tinganesi	3.000
Ferðsluveðhald, P/F Eystur- og Sandoyartunlar (stuðulsj.)	1.000
P/F Suðuroyartunnil (stuðulsj.)	100.000
§ 3. Fíggjarmál	**37.500**
TAKS	1.500
Talgildu Føroyar	15.000
Búskaparskipanir landsins	3.000
Nýggj skattaskipan	18.000
§ 5. Fiskivinnu- og samferðslumál	**139.300**
Umvæling av almennum bygningum	36.500
Almennir bygningar, søla	-13.000
Landsins ognir	4.000
Tilbúgvingarætlan	6.400
Nýggir landsvegir	60.400
Havnir	2.000
Strandfaraskip landsins, endurnýggjan o.a.	43.000
§ 6. Uttanríkis- og vinnumál	**0**
§ 7. Barna- og undirvísingarmál	**81.600**
KT-skipan til skúlaverkið	2.600
Tekniski skúli í Klaksvík	15.000
Fiskivinnuskúlin	2.000
Fróðskaparsetur Føroya, kampus o.a.	62.000

framhald...

...framhald

§ 11. Heilsumál	**78.800**
Medicoteknisk tól	10.300
Nýggj talgild heilsuskipan	4.000
Apoteksverkið, Suðuroy	8.800
Tól og útgerð til heilsutænastur í nærumhvørvinum (stuðulsj.)	1.700
Klaksvíkar sjúkrahús	26.000
Suðuroyar sjúkrahús	5.000
Landssjúkrahúsið, útbygging og viðlíkahald	23.000

§ 12. Almanna- og mentamál	**120.100**
Tjóðleikhús	1.000
Almannaverkið, KT-skipan	5.000
Tjóðsavnið, goymslubygningur	30.000
Kringvarp Føroya, tøknilig útgerð	3.000
Listasavn Føroya	4.000
Varðveiting av mentanararvinum	6.000
Víkingagarðurin í Hovi (stuðulsj.)	100
Sjósavn, løgustuðul (stuðulsj.)	5.000
Stuðul til kirkjubygging (stuðulsj.)	7.000
Hamragarður	4.000
Bústovnar o.a., bygging o.a.	55.000

§ 14. Lógarmál	**0**

§ 18. Umhvørvismál	**5.500**
Landstreymsverkætlanir (stuðulsj.)	4.000
Umhvørvisstovan, útgerð til sjóuppmáting	1.500

Løgur §1 - §18 tilsamans	**566.800**

Yvirlit yvir løgukendar útreiðslur í 2026 *(túsund kr.)*	
Stuðul til kirkjubygging	7.000
Tól og útgerð til heilsutænastur í nærumhvørvinum	1.700
Víkingagarðurin í Hovi	100
Sjósavn, løgustuðul	5.000
Landstreymsverkætlanir	4.000
Ferðsluveðhald til P/F Eystur- og Sandoyartunlar	1.000
P/F Suðuroyartunnil	100.000
Tilsamans	**118.800**

Játtanareftirlit í fíggjarárinum 2025

Í játtanarskipanini er ásett, at saman við fíggjarlógaruppskotinum skal greiðast frá játtanareftirlitinum í fíggjarárinum. Her verður greitt frá játtanarligu støðuni samanlagt og fyri hvørja grein sær. Eisini verður víst yvirlit yvir, hvørjar játtanir (høvuðskontur) verða mettar at fara at víkja frá upprunaligu játtanini, tá ið fíggjarárið er farið. Her verða bæði tiknar við eykajáttanir, umbidnar játtanir og játtanir, har ið mett er, at frávik verður, tá ið fíggjarárið er av.

Meting av úrsliti landskassans í 2025 sammett við fíggjarlógina fyri 2025

1.000 kr.	FL-2025	Meting 2025	Frávik	Frávik (%)
Inntøkur	**7.407.428**	**7.473.328**	**65.900**	**0,9%**
Rakstrarútreiðslur	6.909.251	6.908.091	-1.160	0,0%
Løgur	487.550	596.275	108.725	22,3%
Løgukendar útr.	130.950	147.050	16.100	12,3%
Útreiðslur tilsamans	**7.527.751**	**7.651.416**	**123.665**	**1,6%**
RLÚ-úrslit	**-120.323**	**-178.088**	**-57.765**	

Í talvuni omanfyri er víst RLÚ-úrslit fyri greinarnar 1 til 20 (vanligir postar). Fyri 2025 verður roknað við, at úrslitið (RLÚ-1) verður eitt hall á um 180 mió. kr.

Rakstrarútreiðslurnar verða væntandi um 1 mió. kr. lægri enn mett í fíggjarlógini. Inntøkurnar verða væntandi um 66 mió. kr. hægri enn mettu inntøkurnar á fíggjarlógini. Løgu- og løgukendar útreiðslur verða væntandi 125 mió. kr. hægri enn mett í fíggjarlógini.

Meting av inntøkum landskassans í 2025 sammett við fíggjarlógina eftir virksemisøki

1.000 kr.	R-2024	FL-2025	Meting 2025	Frávik	Frávik (%)
Rentur av skuld	-86.000	-138.500	-138.500	0	0,0%
Rentuinntøkur o.tíl.	105.223	116.000	116.000	0	0,0%
Skattainntøkur	3.284.450	3.390.128	3.459.128	69.000	2,0%
Avgjøld og tollur	3.576.979	3.741.900	3.704.000	-39.900	-1,0%
Ymsar inntøkur	74.450	160.100	175.100	15.000	9,4%
Flytingar	-433.367	-429.000	-423.000	-6.000	-1,4%
Heildarveiting o.t.	591.800	566.800	566.800	0	0%
Tilsamans	**7.113.535**	**7.407.428**	**7.473.328**	**65.900**	**0,9%**

Meting av útreiðslum landskassans* í 2025 sammett við fíggjarlógina eftir grein

1.000 kr.		FL-2025	Meting 2025	Frávik	Frávik (%)
§ 1	Løgtingið	90.887	89.237	-1.650	-1,8%
§ 2	Løgmansfyrisitingin	163.430	158.430	-5.000	-3,1%
§ 3	Fíggjarmál	484.330	493.130	8.800	1,8%
§ 5	Fiskivinnu- og samferðslumál	742.230	776.715	34.485	4,6%
§ 6	Uttanríkis- og vinnumál	203.295	206.235	2.940	1,4%
§ 7	Barna- og umhvørvismál	1.507.585	1.551.541	43.956	2,9%
§ 11	Heilsumál	1.759.265	1.809.518	50.253	2,9%
§ 12	Almanna- og mentamál	2.449.701	2.437.892	-11.809	-0,5%
§ 14	Lógarmál	52.490	53.690	1.200	2,3%
§ 18	Umhvørvismál	74.538	75.028	490	0,7%
	Útreiðslur tilsamans	**7.527.751**	**7.651.416**	**123.665**	**1,6%**
§ 20	**Inntøkur**	**7.407.428**	**7.473.328**	**65.900**	**0,9%**
	RLÚ-úrslit	**-120.323**	**-178.088**	**-57.765**	

* Í talvuni eru vístar rakstrarjáttanir, løgujáttanir, lógarbundnar játtanir og stuðulsjáttanir tilsamans.

Rakstrarjáttanareftirlit

Niðanfyri verður hugt nærri eftir, hvussu játtanarliga støðan er á rakstrarjáttanum, stuðulsjáttanum og lógarbundnum játtanum á landsstýrismannaøkjunum. Løgujáttanir eru ikki við í talvunum niðanfyri. Tó eru løgukendar játtanir frámerktar við *.
Serstakt løgujáttanareftirlit er síðst í frágreiðingini eftir rakstrarjáttanareftirlitið.

§ 1 Løgtingið

Játtanarliga støðan í september 2025

Høvuðs-konta	Stovnur/játtan	Játtanarslag	Frávik *(tús. kr.)*	Viðmerking
10.1.02.	Eftir- og bíðiløn til løgtingsmenn	Lógarbundin játtan	-500	Mett frávik
10.1.03.	Løgtingsarbeiði	Rakstrarjáttan	-2.150	Mett frávik
10.2.07.	Løgtingsins umboðsmaður	Rakstrarjáttan	-400	Mett frávik
Tilsamans			**-3.050**	

Meting av útreiðslum á § 1 í 2025 sammett við fíggjarlógina fyri 2025

1.000 kr.	FL-2025	Meting 2025	Frávik	Frávik (%)
Stuðulsjáttan	0	0	0	0,0%
Rakstrarjáttan	77.387	74.837	-2.550	-3,3%
Lógarbundin játtan	12.500	12.000	-500	-4,0%
Tilsamans	**89.887**	**86.837**	**-3.050**	**-3,4%**

§ 2 Løgmansfyrisitingin

Játtanarliga støðan í september 2025

Høvuðs-konta	Stovnur/játtan	Játtanarslag	Frávik *(tús. kr.)*	Viðmerking
12.3.01.	Løgmaður og landsstýrið	Rakstrarjáttan	700	Mett frávik
38.2.28.	Ferðsluveðhald til P/F Eystur- og Sandoyartunlar *	Stuðulsjáttan	-8.500	Mett frávik
Tilsamans			**-7.800**	

Meting av útreiðslum á § 2 í 2025 sammett við fíggjarlógina fyri 2025

1.000 kr.	FL-2025	Meting 2025	Frávik	Frávik (%)
Stuðulsjáttan	134.330	125.830	-8.500	-6,3%
Rakstrarjáttan	26.100	26.800	700	2,7%
Lógarbundin játtan	0	0	0	0,0%
Tilsamans	**160.430**	**152.630**	**-7.800**	**-4,9%**

§ 3 Fíggjarmál

Játtanarliga støðan í september 2025

Høvuðs-konta	Stovnur/játtan	Játtanarslag	Frávik *(tús. kr.)*	Viðmerking
11.1.36.	Sáttmálaviðurskifti	Rakstrarjáttan	300	Eykajáttan sept.
15.1.04.	TAKS	Rakstrarjáttan	900	Eykajáttan mars
18.1.02.	Ymsar tænastumannaeftirlønir	Lógarbundin játtan	3.500	Mett frávik
22.4.01.	Stuðul til rentuútreiðslur	Lógarbundin játtan	10.000	Eykajáttan sept.
Tilsamans			**14.700**	

Meting av útreiðslum á § 3 í 2025 samanborið við fíggjarlógina fyri 2025

1.000 kr.	FL-2025	Meting 2025	Frávik	Frávik (%)
Stuðulsjáttan	300	300	0	0,0%
Rakstrarjáttan	177.130	178.330	1.200	0,7%
Lógarbundin játtan	268.000	281.500	13.500	5,0%
Tilsamans	**445.430**	**460.130**	**14.700**	**3,3%**

§ 5 Fiskivinnu- og samferðslumál

Játtanarliga støðan í september 2025

Høvuðs-konta	Stovnur/játtan	Játtanarslag	Frávik *(tús. kr.)*	Viðmerking
11.1.23.	Landsins ognir	Rakstrarjáttan	1.900	Eykajáttan mars
34.3.01.	Havstovan	Rakstrarjáttan	650	Eykajáttan sept.
38.1.02.	Landsverk	Rakstrarjáttan	-490	Eykajáttan mars
Tilsamans			**2.060**	

Meting av útreiðslum á § 5 í 2025 sammett við fíggjarlógina fyri 2025

1.000 kr.	FL-2025	Meting 2025	Frávik	Frávik (%)
Stuðulsjáttan	3.400	3.400	0	0,0%
Rakstrarjáttan	503.230	506.270	2.060	0,4%
Lógarbundin játtan	1.500	1.500	0	0,0%
Tilsamans	**508.130**	**510.170**	**2.060**	**0,4%**

§ 6 Uttanríkis- og vinnumál

Játtanarliga støðan í september 2025

Høvuðs-konta	Stovnur/játtan	Játtanarslag	Frávik *(tús. kr.)*	Viðmerking
37.1.20.	Vinnustovnurin	Rakstrarjáttan	800	Eykajáttan mars
37.2.04.	Endurgjald til skipasmíð	Stuðulsjáttan	1.800	Eykajáttan sept.
37.5.04.	Heilsufrøðiliga starvsstovan	Rakstrarjáttan	340	Eykajáttan sept.
Tilsamans			**2.940**	

Meting av útreiðslum á § 6 í 2025 sammett við fíggjarlógina fyri 2025

1.000 kr.	FL-2025	Meting 2025	Frávik	Frávik (%)
Stuðulsjáttan	64.495	66.295	1.800	2,8%
Rakstrarjáttan	138.800	139.940	1.140	0,8%
Lógarbundin játtan	0	0	0	0,0%
Tilsamans	**203.295**	**206.235**	**2.940**	**1,5%**

§ 7 Barna- og útbúgvingarmál

Játtanarliga støðan í september 2025

Høvuðs-konta	Stovnur/játtan	Játtanarslag	Frávik *(tús. kr.)*	Viðmerking
21.3.01.	Barnavernd	Lógarb. játtan	-1.015	Eykajáttan sept.
21.3.14.	Barnaverndarstovnar	Rakstrarjáttan	-1.700	Eykajáttan sept.
23.2.01.	Fólkaskúlin	Rakstrarjáttan	2.000	Eykajáttan mars
23.2.02.	Sernám	Rakstrarjáttan	2.300	Eykajáttan sept.
23.2.06.	Skúlatilboð til ung við breki (Rásin)	Rakstrarjáttan	600	Eykajáttan sept.
23.2.03.	Stuðul til fólkaskúlar	Stuðulsjáttan	400	Eykajáttan mars
23.3.05.	Miðnámsútbúgvingar	Rakstrarjáttan	2.800	Mett frávik Eykajáttan mars og sept.
23.5.02.	Ítróttaháskúlin í Suðuroy, løgustuðul*	Stuðulsjáttan	7.300	Eykajáttan sept.
23.5.05.	Húsarhaldsskúlin í Klaksvík, løgustuðul*	Stuðulsjáttan	9.000	Eykajáttan mars
Tilsamans			**21.685**	

Meting av útreiðslum á § 7 í 2025 samanborið við fíggjarlógina fyri 2025

1.000 kr.	**FL-2025**	**Meting 2025**	**Frávik**	**Frávik (%)**
Stuðulsjáttan	64.972	81.672	16.700	25,7%
Rakstrarjáttan	1.205.383	1.211.383	6.000	0,5%
Lógarbundin játtan	144.630	143.615	-1.015	-0,7%
Tilsamans	**1.414.985**	**1.436.670**	**21.685**	**1,5%**

§ 11 Heilsumál

Játtanarliga støðan í september 2025

Høvuðs-konta	Stovnur/játtan	Játtanarslag	Frávik *(tús. kr.)*	Viðmerking
11.1.24.	Heilsumálaráðið	Rakstrarjáttan	420	Eykajáttan august
20.1.10.	Koppsetingar	Lógarb. játtan	2.500	Eykajáttan mars
20.2.02.	Heilsutrygd	Rakstrarjáttan	800	Eykajáttan sept.
20.2.03.	Heilsutrygdarveitingar	Rakstrarjáttan	-9.500	Eykajáttan sept.
20.2.04.	Kommunulæknaskipanin	Rakstrarjáttan	-2.000	Eykajáttan mars og sept.
20.3.04.	Landssjúkrahúsið	Rakstrarjáttan	-3.000	Eykajáttan mars og sept.
20.3.15.	Suðuroyar sjúkrahús	Rakstrarjáttan	2.000	Eykajáttan mars
20.3.19.	Serstakur sjúkrahúsheilivágur	Rakstrarjáttan	-6.000	Eykajáttan mars og sept.
Tilsamans			**-14.780**	

Meting av útreiðslum á § 11 í 2025 sammett við fíggjarlógina fyri 2025

1.000 kr.	FL-2025	Meting 2025	Frávik	Frávik (%)
Stuðulsjáttan	4.575	4.575	0	0,0%
Rakstrarjáttan	1.689.220	1.671.940	-17.280	-1,0%
Lógarbundin játtan	15.770	18.270	2.500	15,9%
Tilsamans	**1.709.565**	**1.694.785**	**-14.780**	**-0,9%**

§ 12 Almanna- og mentamál

Játtanarliga støðan í september 2025

Høvuðs-konta	Stovnur/játtan	Játtanarslag	Frávik *(tús. kr.)*	Viðmerking
11.1.26.	Almanna- og mentamálaráðið	Rakstrarjáttan	10	Eykajáttan mars og august
21.1.02.	Almannaverkið	Rakstrarjáttan	2.000	Eykajáttan sept.
21.1.11.	Brekumboðið	Rakstrarjáttan	-450	Eykajáttan sept.
21.1.22.	Stuðul til feløg	Stuðulsjáttan	410	Eykajáttan mars
21.3.04.	Barnapeningur veittur í forskoti	Lógarb. játtan	-200	Eykajáttan sept.
21.3.06.	Barnaískoyti	Lógarb. játtan	350	Eykajáttan sept.
21.3.09.	Familjuískoyti	Lógarb. játtan	-800	Eykajáttan sept.
21.4.01.	Dagpeningaskipanin	Lógarb. játtan	-2.600	Eykajáttan sept.
21.6.09.	Trivnaðartænastur	Rakstrarjáttan	2.055	Eykajáttan mars og sept.
21.7.01.	Almannatrygd	Lógarb. játtan	-580	Eykajáttan sept.
21.8.01.	Fólkapensjón	Lógarb. játtan	-17.000	Eykajáttan mars og sept.
21.8.05.	Fyritíðarpensjón	Lógarb. játtan	9.700	Eykajáttan mars og sept.
21.8.13.	Viðbót til ávísar pensjónistar	Lógarb. játtan	500	Eykajáttan sept.
24.3.03.	Søvnini	Rakstrarjáttan	600	Eykajáttan mars
24.3.22.	Listasøvn	Rakstrarjáttan	3.500	Eykajáttan mars
Tilsamans			**-2.505**	

Meting av útreiðslum á § 12 í 2025 samanborið við fíggjarlógina fyri 2025

1.000 kr.	**FL-2025**	**Meting 2025**	**Frávik**	**Frávik (%)**
Stuðulsjáttan	136.284	136.694	410	0,3%
Rakstrarjáttan	689.576	697.291	7.715	1,1%
Lógarbundin játtan	1.555.591	1.544.961	-10.630	-0,7%
Tilsamans	**2.381.451**	**2.378.946**	**-2.505**	**-0,1%**

§ 14 Lógarmál

Játtanarliga støðan í september 2025

Høvuðs-konta	Stovnur/játtan	Játtanarslag	Frávik *(tús. kr.)*	Viðmerking
11.1.28.	Løgmálaráðið	Rakstrarjáttan	350	Eykajáttan mars
14.1.10.	Útlendingastovan	Rakstrarjáttan	850	Eykajáttan sept.
Tilsamans			**1.200**	

Meting av útreiðslum á § 14 í 2025 samanborið við fíggjarlógina fyri 2025

1.000 kr.	FL-2025	Meting 2025	Frávik	Frávik (%)
Stuðulsjáttan	21.075	21.075	0	0,0%
Rakstrarjáttan	30.835	32.035	1.200	3,9%
Lógarbundin játtan	580	580	0	0,0%
Tilsamans	**52.490**	**53.690**	**1.200**	**2,3%**

§ 18 Umhvørvismál

Játtanarliga støðan í september 2025

Høvuðs-konta	Stovnur/játtan	Játtanarslag	Frávik *(tús. kr.)*	Viðmerking
11.1.65.	Umhvørvismálaráðið	Rakstrarjáttan	490	Eykajáttan mars
Tilsamans			**490**	

Meting av útreiðslum á § 18 í 2025 samanborið við fíggjarlógina fyri 2025

1.000 kr.	FL-2025	Meting 2025	Frávik	Frávik (%)
Stuðulsjáttan	8.950	8.950	0	0,0%
Rakstrarjáttan	65.588	66.078	490	0,8%
Lógarbundin játtan	0	0	0	0,0%
Tilsamans	**74.538**	**75.028**	**490**	**0,7%**

Inntøkujáttanareftirlit

Játtanarliga støðan í september 2025

Høvuðs-konta	Stovnur/játtan	Játtanarslag	Frávik *(tús. kr.)*	Viðmerking
50.2.01.	Rentuinntøkur av innistandandi	Ógreinað	18.800	Nýggj meting
50.2.10.	Útgoldið yvirskot frá Danmarks Nationalbank	Ógreinað	-5.000	Nýggj meting
52.1.01.	Vanligur landsskattur	Ógreinað	80.000	Nýggj meting
52.1.07.	Felagsskattur	Ógreinað	-40.000	Nýggj meting
52.1.11.	Kapitalvinningsskattur	Ógreinað	-50.000	Nýggj meting
52.1.12.	Skattur av vinningi frá sølu av veiðirættindum	Ógreinað	80.000	Nýggj meting
52.1.13.	Avgjald av kapitaleftirlønum	Ógreinað	-5.000	Nýggj meting
52.1.27.	Gjald til Heilsutrygd	Ógreinað	4.000	Nýggj meting
52.2.01.	Meirvirðisgjald	Ógreinað	10.000	Nýggj meting
52.2.04.	Tollavgjøld	Ógreinað	4.000	Nýggj meting
52.2.07.	Punktgjøld	Ógreinað	-9.000	Nýggj meting
52.2.10.	Lønarhæddaravgjald	Ógreinað	2.000	Nýggj meting
52.2.13.	Brennioljugjald	Ógreinað	26.000	Nýggj meting
52.2.14.	Loyvisgjald á alivinnu	Ógreinað	-103.100	Nýggj meting

52.2.15.	Avgjald á fiskatilfeingi	Ógreinað	-2.800	Nýggj meting
52.2.19.	Skrásetingargjald	Ógreinað	30.000	Nýggj meting
52.2.22.	Vegskattur	Ógreinað	-1.000	Nýggj meting
52.2.25.	Ferðaavgjald	Ógreinað	-1.000	Nýggj meting
52.2.30.	Tinglýsingargjald	Ógreinað	5.000	Nýggj meting
52.3.04.	Útluting frá partafeløgum og grunnum	Ógreinað	15.000	Nýggj meting
52.5.01.	Endurrindan av keyps-MVG	Ógreinað	5.000	Nýggj meting
52.5.04.	Endurrindan fyri DIS/FAS inntøkur	Ógreinað	1.000	Nýggj meting
Tilsamans			**65.900**	

Løgujáttanareftirlit

Løgukarmurin í fíggjarlógini fyri 2025 er um 619 mió. kr. tilsamans. Harafturat eru løgukendar játtanir (løgustuðul) um 130 mió. kr í fíggjarlógini fyri 2025, og um 320 mió. kr. av løgujáttanum eru fluttar fram frá undanfarna ári, og eykajáttanir eru samtyktar ella umbidnar fyri 27 mió. kr. Samlaða játtanin til løgur og løgukendar útreiðslur við framfluttum játtanum og eykajáttanum er sostatt um 970 mió. kr. í 2025.

Roknast kann við, at um 744 mió. kr. verða nýttar av løgujáttanunum í 2025, og mett verður, at um 230 mió. kr. verða fluttar fram til 2026. Torført er at meta um nýtsluna av løgujáttanum fyri árið, og metingarnar skulu tí lesast við fyrivarni.

Heiti *(1.000 kr.)*	**Flutt frá eldri árum**	**FL 2025**	**EyJ 2025**	**Játtan tils. 2025**	**Mett nýtsla 2025**	**Mett flyting til 2026**
§ 1 Løgtingið	**0**	**1.000**	**1.400**	**2.400**	**2.400**	**0**
Løgtingsbygningurin	0	1.000	1.400	2.400	2.400	0
§ 2 Løgmansfyrisitingin	**4.341**	**115.000**	**0**	**119.341**	**109.300**	**999**
Umbygging í Tinganesi	2.799	3.000	0	5.799	4.800	999
Suðuroyartunnil, fork. og fyrireik.	1.542	0	0	1.542	1.000	0
Ferðsluveðhald, P/F Eystur- og sandoyartunlar *	0	12.000	0	12.000	3.500	0
P/F Suðuroyartunnilin *	0	100.000	0	100.000	100.000	0
§ 3 Fíggjarmál	**993**	**38.900**	**0**	**39.893**	**33.000**	**6.893**
Talgildu Føroyar	0	10.000	2.000	10.000	12.000	0
Búskaparskipan landsins	0	3.000	0	3.000	3.000	0
Nýggja skattaskipan	993	25.900	-2.000	24.893	15.000	9.893

framhald...

§ 5 Fiskivinnu- og samferðsl.	**101.052**	**234.100**	**27.000**	**362.152**	**266.525**	**111.627**
Umvæling av almennum bygn.	204	36.500	0	36.704	36.704	0
Søla av landsins ognum	0	-21.000	-1.000	-22.000	-6.000	0
Nýggir landsvegir	54.536	70.900	28.000	153.436	97.000	56.436
Havnir	9.124	3.000	0	12.124	12.124	0
Strandfaraskip landsins	9.248	131.500	0	140.748	120.000	20.748
Innkomuvegur Tórshavn	6.597	0	0	6.597	6.597	0
Innkomuvegur Runavík	21.343	8.200	0	29.543	0	29.543
Flogferðsla, løga	0	5.000	0	5.000	100	4.900
§ 6 Uttanríkis- og vinnumál	**0**	**0**	**0**	**0**	**0**	**0**
§ 7 Barna- og útbúgvingarmál	**50.272**	**92.950**	**6.523**	**149.745**	**131.521**	**18.224**
KT-skipan til skúlaverkið	0	8.300	0	8.300	8.300	0
Skúlatilboð til ung við breki (Rásin)	7.122	0	0	7.122	7.122	0
Fróðskaparsetur Føroya	19.735	49.000	-11.300	57.435	46.000	11.435
Húsarhaldsskúlin í Klaksvík *	0	0	9.000	9.000	9.000	0
Miðnám á Kambsdali	21.626	20.300	3.100	45.026	45.026	0
Tekniski skúli í Klaksvík	1.789	15.000	0	16.789	10.000	6.789
Ítróttaháskúlin í Suðuroy *	0	350	7.300	7.650	7.650	0
Avh. og útv. av ognum millum land og Tórshavnar komm.	0	0	-1.577	-1.577	-1.577	0
§ 11 Heilsumál	**104.995**	**49.700**	**8.700**	**163.395**	**114.733**	**48.662**
Medicoteknisk tól	1.747	13.400	0	15.147	15.147	0
Landssjúkrahúsið, útbygging	53.147	18.300	4.200	75.647	50.000	25.647
Klaksvíkar sjúkrahús	2.400	10.000	0	12.400	7.000	5.400
Apoteksverkið	13.086	0	4.500	17.586	17.586	0
Suðuroyar sjúkrahús	8.465	3.000	0	11.465	1.000	10.465
Nýggj talgild heilsuskipan	9.150	5.000	0	14.150	7.000	7.150
Útvegan av bygningi til viðgerðarstovn	17.000	0	0	17.000	17.000	0

framhald...

...framhald

§ 12 Almanna- og mentamál	**60.607**	**84.850**	**-16.600**	**128.857**	**83.746**	**45.061**
Bústovnar o.a.	32.194	49.250	-26.000	75.444	50.000	25.444
Tjóðleikhús	5.717	2.000	0	7.717	0	7.717
Varðveiting av mentanararvinum	2.696	3.000	0	5.696	5.696	0
Sjóndepil	0	750	0	750	750	0
Listasavn Føroya	0	4.500	0	4.500	1.000	3.500
Tjóðsavnið	0	5.000	0	5.000	1.000	4.000
Hamragarður	0	3.750	1.100	4.850	450	4.400
Stuðul til kirkjubygging *	0	4.000	0	4.000	4.000	0
Stórhøll í Hoyvík *	0	10.000	0	10.000	10.000	0
Sjósavn, løgustuðul *	0	2.500	0	2.500	2.500	0
Víkingagarður í Hovi *	0	100	0	100	100	0
Bústovnar, løgustuðul *	0	0	8.300	8.300	8.300	0
§ 14 Lógarmál	**0**	**0**	**0**	**0**	**0**	**0**
§ 18 Umhvørvismál	**0**	**2.000**	**0**	**2.000**	**2.000**	**0**
Landstreymsverkætlanir *	0	2.000	0	2.000	2.000	0
Løgujáttanir tilsamans	**322.260**	**618.500**	**27.023**	**967.783**	**743.325**	**231.416**

*Løgukendar útreiðslur